# Tvíburarnir Alessia og Livia kanska á lívi kortini

**ÚTLOND** Hóast pápin hevur skrivað, at tvíburarsystrarnar Alessia og Livia »hvíla í friði«, er sveisiska løgreglan ikki sannførd um, at tær eru deyðar. Tí heldur løgreglan fram at leita eftir systrunum



*Tann 28. januar var pápin eftir Alessiu og Liviu, tí hann skuldi hava tær nakrar dagar. Tann 5. februar beindi pápin fyri sær við at leypa fyri eitt tok, men Alessia og Livia eru ikki at finna*

*Mynd: AFP*

Árni Joensen

Løgreglan í Sveis hevur ikki mist vónina um at finna tær báðar horvnu tvíburargenturnar Alessiu og Liviu aftur á lívi. Fyrradagin kom løgreglan við teimum rættiliga óvæntaðu boðunum, at kanska vóru genturnar ongantíð farnar úr Sveis.

Higartil hevur løgreglan hildið seg til eitt bræv, sum pápin at gentunum, Matthias Schepp, skrivaði og koyrdi í postin, áðrenn hann beindi fyri sær við at leypa út fyri eitt tok í Italia tann 5. februar. Í brævinum til mammuna skrivaði hann, at systrarnar "hvíla í friði", og at "tær hava ikki liðið".

Kanningar hjá løgregluni í Sveis, Fraklandi og Italia bendu á, at pápin var farin til Korsika við gentunum, og tá eitt vitni vildi vera við, at pápin var einsamallur, tá hann fór av aftur oynni, fór løgreglan hagar at leita. Í vikuni fór mamman at gentunum, eisini til Korsika.

Men sambært talsmanninum hjá sveisisku løgregluni, Jean-Christophe Sauterel, eru allir møguleikar opnir. Tað, sum stendur í brævinum frá pápanum, kann vera rætt, men ein annar møguleiki er, at genturnar ongantíð fóru úr Sveis, segði hann við tíðindafólk mikudagin.

Sveisiska løgreglan er komin eftir, at Matthias Schepp hevði roynt at útvegað sær upplýsingar um vápn og eiturevni, áðrenn hann fór úr Sveis, og at hann eisini hevði hugt at ferðaætlanum hjá eitt nú onkrum ferjum.

arni@sosialurin.fo

# Skerja bjargingtænastuna við Hetland

**SPARING** Ætlanin hjá bretsku stjórnini at niðurleggja fleiri bjargingarstøðir og harvið taka úr drift stórar sleipibátar, ið annars skulu veita trygd og verja umhvørvið, hava skapt sanna øsing í Hetlandi.

Jan Müller

*Ein av fýra sleipibátum, sum ætlanin er at taka úr drift vegna sparingar.*




Sonn øði hevur tikið seg upp í Hetlandi og Orknoyggjunum eftir, at bretska stjórnin hevur givið vaktar- og bjargingartænatuni í øllum Bretlandi boð um at skerja raksturin við einum fjórðingi og harvið niðurleggja 10 av teimum 18 vaktar- og bjargingarstøðunum kring landið. Og so kemur hetta stutt eftir álvarsligu vanlukkuna í Meksikoflógvanum og í eini tíð, har umhvørvisfelagsskapir royna at steðga oljuboring vestan fyri Hetland orsakað av dálkingarvandanum.

Avgerðin gongur serliga útyvir oyggjabólkarnar fyri norðan, hvørs stóru og nýggju togarar eftir øllum at døma verða tiknir úr drift. Togarar, sum hava alstóran týdning fyri trygdina og til at fyribyrgja dálking. Hesir togarar komu nøkur ár eftir Braervanlukkuna og skuldu veita neyðugu trygdina, um ein vanlukka av slíkum slag skuldi hent aftur.

Bæði hetlendignar og orknoyingar meta, at verður avgerðin sett í verk, so fer hetta at kosta mannalív, fyri ikki at tosa um vandan fyri álvarsligum avleiðingum av dálking frá eitt nú oljuvinnuni, tí so nógv virksemi er nettupp í økinum vestan fyri Hetland, har oljuvinnan mennist fyri hvønn dag. Eisini altjóða oljufeløg, sum arbeiða í økinum, eru farin uppí kórið, sum mótmælir avgerðini hjá stjórnini í London.

Tey mongu mótmælini hava fingið stjórnina at kanna alt málið enn einaferð, áðrenn spariætlanin endaliga verður sett í verk. Umboð fyri stjórnina siga, at talan er ikki bara um eina sparing men eins nógv um at nútímansgera vaktar- og bjargingartænastuna og kemur hetta ikki minst í kjalarvørrinum á tøkniligu menningini, sum ger, at tað er ikki tørvur á at hava 18 bjargingarstøðir kring Bretland. Ætlanin er at savna tænastuna í trimum miðdeplum, sum hava opið alt samdøgrið, nevniliga Aberdeen, Southhampton og Dover. Aftrat hesum verða so 5-6 smærri støðir, sum bara fara at hava opið í dagtímunum. Fyri tíð síðani varð talið á støðum 28.

## Raka oljuvinnu

Umrøddu skerjingar koma dátt við hjá oljuvinnuni vestan fyri Hetland og eisini hjá umhvørvisfelagsskapum, tí við at niðurleggja stóran part av vaktar- og bjargingartænastuni í økinum, har nógv oljuvirksemi er og har stórar útbyggingar standa fyri framman, meta bæði lokalpolitikarar og oljufeløg, at skorið verður mundandi niður uppá trygdina í økinum. Avgerðin fer at hótta bæði mannalív og umhvørvið.

Víst verður á, at tað er ikki samsvar millum ynskini frá stjórnini at fáa oljufeløg at gera fleiri íløgur í oljuframleiðslu vestan fyri Hetland samtíðis sum tað so týðandi bjargingarvirksemið verður minkað ella heilt niðurlagt.

Ein kann so siga, at avgerðin eisini kann fáa týdning fyri eina komandi føroyska oljuvinnu. Tað er givið, at verður olja og gass framleitt á føroyska landgrunninum skamt frá markinum einaferð í framtíðini, vil tað eisini hava stóran týdning, at Hetland er væl útgjørt á vaktar- og bjargingarøkinum, um og tá óhapp henda til havs. Ein kann siga, at nú Føroyar eru eftirbátur, tá tað snýr seg um tilbúgving og harvið eisini viðvíkjandi eini munadyggari vaktar- og bjargingartænastu, tá koma skerjingar og sparingar í grannalagnum á hesum øki illa við.

Herfyri hoyrdu vit, at um tað ringasta skuldi hent vestan fyri Hetland í sambandi við boring á djúpum vatni, so kann hetta hava við sær lemjandi oljudálking, sum eisini kann raka føroyskt øki. At skerja vaktar- og bjargingartænastuna í einum oljumenningarøki um somu tíð sum tað frá fleiri síðum verður ávarað móti vandanum fyri dálking tykist ikki serliga væl umhugsað sigur kelda í føroyska oljuumhvørvinum, sum ikki ynskir at verða nevnd.

Tá tosa vit ikki ein gang um teir vandar, sum alla tíðina lúra millum Føroyar og Hetland, tá risastór tangaskip við olju og gassi úr Ruslandi og Norðurnoregi sigla framvið oyggjarnar.

jan@sosialurin.fo

*Kelda: Shetland News og http://www.parliamentlive.tv/Main/Player.aspx?meetingId=7625 har til ber at siggja hoyringina í parlamentinum í London um hesa ætlan.*